# Reglugerð fyri Dagstovnin á Argjum

§ 1

Vøggustovan/barnagarðurin, ið er sjálvsognarstovnur, er góðkendur við heimild í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt nr. 67 frá 10. mai 2000. Stovnurin hevur rætt til at fáa almennan studning sambært somu lóg og er skyldigur til at vera undir almennum eftirliti og fylgja teimum umsitingarligu fyriskipanum, ið eru ásettar sambært somu lóg.

§ 2

1.stk.
Endamál stovnsins er gerandisdagar í dagtímunum at hava umsorgan fyri, menna og menta børnum - í einum kristnum anda í tryggum viðurskiftum á námsfrøðiligan fullgóðan hátt - í aldrinum 0 til 7 ár, sum eru búsitandi í Tórshavnar kommunu.

2.stk.
Javnstillað við 1.stk. er endamál stovnsins at samskipa tiltøk fyri børn, sum av fysiskum, sálarligum og sosialum orsøkum hava tørv fyri meiri stuðli enn tí, sum heimið megnar at geva.

§ 3

1.stk.
Sjálvsognarstovnurin verður stjórnaður av eini fimmmannanevnd. Tórshavnar kommuna velur tríggjar limir fyri sítt valskeið. Hinir báðir limirnir verða valdir av og millum foreldrini, sum hava børn á stovninum. Valini eru fyri valskeið býráðsins. Um eitt av foreldraumboðunum ikki longur hevur barn sítt á stovninum, verður annað umboð at velja innan 14 dagar frá tí, at barnið fór av stovninum.

2.stk.
Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni og møguligum kassameistara.

3.stk.
Tórshavnar kommuna og foreldrini skulu hava valt síni umboð í nevndina í seinasta lagi tveir mánaðir eftir, at býráðsval hevur verið. Kommunan skal hava boð beinanvegin um, hvør er valdur í nevndina, og hvussu hon hevur skipað seg.

§ 4

1.stk
Nevndin heldur fund í minsta lagi fýra ferðir árliga, harav í minsta lagi tvær ferðir á stovninum. Formaðurin boðar annars til fundar so ofta, hann heldur hetta vera neyðugt, ella um nevndarlimir krevja tað. Nevndarfundur er viðtøkuførur, tá ið í minsta lagi tríggir limir eru á fundi.

2.stk.

Um formanninum berst frá, kemur næstformaðurin í formansins stað. Um formaðurin- hóast ein ella fleiri hava biðið um tað- ikki boðar til fundar, kunna tveir aðrir nevndarlimir boða til fundar.

3.stk.
Fundaravgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta. Stendur á jøvnum millum atkvøðubólkar, er formansins atkvøða avgernandi. Formaðurin leiðir fundirnar og ansar eftir, at tiknar avgerðir verða framdar. Gerðabók verður skrivað um fundaravgerðirnar og undirskrivað av nevndarlimunum.

§ 5

1.stk.
Til tess at røkja dagligu leiðslu stovnsins setir nevndin ein leiðara. Allar umsóknir við innstilling nevndarinnar verða at senda kommununi, sum skal góðkenna avgerðina. Leiðarin setir pedagogar og hjálparfólk í størv, sum annars eru neyðug á stovninum. Fólk, sum verða sett í starv eftir hesi reglugerð, verða lønt sambært sáttmála millum Tórshavnar kommuna og avvarðandi yrkisfelag.

2.stk.
Stovnurin hevur opið gerandisdagar í dagtímunum, men kommunan kann eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini geva loyvi til, at stovnurin kann hava opið alt samdøgrið ella í vikuskiftunum sambært § 3 stk. 2 í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt.

3.stk.
Leiðarin hevur ábyrgdina av námsfrøðiligu leiðslu stovnsins og stendur fyri dagliga rakstrinum í samstarvi við hini starvsfólkini.

4.stk.
Tórshavnar kommuna ger upptøkureglur, sum skulu góðkennast av landsstýrismanninum sambært § 4 stk. 2 í løgtingslog nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt.

5.stk.
Leiðarin hevur ábyrgdina av, at gjaldið, ið foreldrini skulu lata, verður kravt og førir í samstarvi við annað starvsfólk hjáveru og gjaldsbók, har tað fyri hvønn dag verður sagt frá, hvørji børn, ið komin eru, og gjaldsdegnum fyri rindaðum gjaldi.

6.stk.
Leiðarin førir høvuðsbók við upplýsingum um tey børn, ið eru upptikin á stovninum, navn teirra og aldur, foreldur, og hvussu leingi tey vóru á stovninum, og um orsøkina til, at tey fóru av stovninum.

7.stk.
Leiðarin skipar fyri arbeiðsætlanum, frítíðarætlanum, sjúkraseðlum o.s.fr. Uppsøgn av starvsfólki verður framd í tráð við tær til eina og hvørja tíð galdandi reglur.

8.stk.
Leiðarin hevur ábyrgdina av, at óregluligar avgerðir ikki verða tiknar á stovninum. Um nevndin tekur avgerð, ið eftir uppfatan leiðarans er í stríð við reglugerðina ella galdandi reglur s.s sáttmáli o.t., hevur leiðarin skyldu til at boða nevndini frá hesum. Um nevndin ikki er samd við leiðaranum hesum viðvíkjandi, verður spurningurin lagdur til Tórshavnar kommunu til støðutakan. Leiðarin og

nevndin skulu taka avgerð kommununnar til eftirtektar, og kann avgerð kommununnar kærast til Almanna- og Heilsumálastýrið.

9.stk.
Er talan um størri útveganir, fer keypið fram, eftir at tilboð eru fingin til vega og løgd fyri nevndina til støðutakan.

10.stk.
Er talan um størri útreiðslur, sum ikki eru innan fyri góðkenda fíggjarætlan, kunnu útreiðslurnar ikki berast uttan góðkenning frá Tórshavnar kommunu.

11.stk.
Til tess at føra bókhald stovnsins kann nevndin seta roknskaparførara, ið eisini skal hava eftirlit við inn- og útgjøldum. Eisini kann nevndin seta húsavørð, sum tá er undirgivin leiðaranum.

§ 6

1.stk.
Eru foreldur í eftirstøðu fyri foreldragjald, kann barnið sigast upp eftir reglunum í kunngerð nr. 6 frá 25. januar 1995 " Kunngerð um gjaldsreglur fyri dagstovnar og dagrøkt".

2.stk.
Um barn er á bíðilista, hvørs tørvur verður mettur hægri enn tørvurin hjá upptiknum barni, er tað ikki uppsagnargrund.

3.stk.
Søkja foreldur um upptøku av barni/um teirra, hevur nevndin ikki loooyvi at sýta teimum upptøku, um pláss er á stovninum.

§ 7

1.stk.
Til tess at binda stovnin rættarliga mótvegis triðjamanni krevst undirskrift av tveimum nevndarlimum, og skal annar vera formaðurin, næstformaðurin ella kassameistarin, um hesin er nevndarlimur.

2.stk.
Avgerðir um keyp, sølu, veðseting ella aðrar avtalur um fasta ogn krevja tó, at allir nevndarlimir skriva undir, og Tórshavnar kommuna góðkennir avgerðina.

3.stk.
Sjálvsognarstovnurin ábyrgist við fæfeingi sínum eftir teimum almennu reglum, ið galda um hetta, fyri allar skuldbindingar, ið liggja á stovninum.

§ 8

1.stk.
Nevndin skal saman við leiðaranum á stovninum gera fíggjarætlan, sum skal sendast Tórshavnar kommunu til góðkenningar. Nevndin velur grannskoðara fyri stovnin. Hann skal vera rikisgóðkendur ella skrássettur.

2.stk.
Grannskoðaður roknskapur saman við grannskoðaraprotokoll skal verða kommununi i hendi í seinasta lagi 1. apríl.

§ 9

Um so er, at stovnurin ikki til fulnar røkir endamál sítt ella verður aavtikin, skulu nevndin og Tórshavnar kommuna samtykkja, at bygningar og ognir stovnsins annars verða nýtt til annað endamál til frama fyri børn og ung.

§ 10

Broytingar í hesi reglugerð krevja undirtøku frá í minsta lagi trimum nevndarlimum. Tórshavnar kommuna skal góðkenna hesar broytingar.

Vegna nevndina | Vegna Tórshavnar Kommunu

_________________________ _________________________